**Fiskimálastýrið**
*Aðalskrivstovan*

# Deildarstjóri til Fiskimálastýrið

Í Fiskimálastýrinum verður starvið sum deildarstjóri fyri Fiskiveiðieftirlitinum hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Fiskiveiðieftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálstýrinum.

**Starvið inniber m.a. hesar upppgávur:**
Dagligu leiðsluna av Fiskiveiðieftirlitinum, herundir:

- Tryggja at Fiskiveiðieftirlitið, fremur dagliga eftirlitið við føroyskum fiskiførum, sum royna undir Føroyum ella aðrastaðni, og við útlendskum fiskiførum, ið royna undir Føroyum.
- Tryggja dagliga eftirlitið við: 1) veittum fiskiloyvum, 2) fiskidagaskipanini á heimaleiðum, 3) latnum og leigaðum kvotum, 4) kvotum hjá føroyskum skipum á fjarleiðum, 5) kvotum hjá føroyskum og útlendskum skipum undir Føroyum, 6) veiðidagbókaskipanini, 7) innvigingarskipanini, og 8) at avreiðingarnar á virkjum í Føroyum og uttanlands samsvara við veiðidagbøkurnar.
- Syrgja fyri dagligu umsitingini av eygleiðaraskipanini á heima-, nær- og fjarleiðum eftir lógini um vinnuligan fiskiskap og eftir millumlanda- og altjóða avtalum, umframt fylgisveinaeftirlit við føroyskum skipum á fjarleiðum og samstarv um fylgisveinaeftirlit í Norðuratlantshavi innan NEAFC og við limalondini í NEAFC. Fiskiveiðieftirlit undir Føroyum verður útint saman við donsku sjóverjuni eftir samstarvsavtalu, sum landsstýrið og ríkismyndugleikin hava góðkent.
- Hava leiðsluna av at skipa og menna málsøkið tilbúgving, vaktar- og bjargingartænastu landsins, umhvørvisvernd á sjónum, eisini basing av oljudálking og MRCC (Maritim Resue Coordination Center).
- Tryggja at skip og onnur útgerð á sjógvi og landi virkar og er til taks soleiðis, at uppgávurnar kunna røkjast á fullgóðan hátt.
- Aðrar, fyri starvið, viðkomandi uppgávar.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur:

- Hægstu nautisku ella aðra viðkomandi útbúgving
- Hollan kunnleika til starvsøkið
- Drúgvar royndir í arbeiðinum við fiskiveiðieftirliti, bjargingartænastu og MRCC (Maritime Rescue Co-ordination Centre)
- Leiðsluroyndir
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa
- Innlit í almenna fyrisiting

**Setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 37. lønarflokki sambært avtalu millum Tænastumannfelag Landsins og Fíggjarmálastýrið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheitið er deildarstjóri og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til aðalstjóran.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálastýrinum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálastýrinum í hendi í seinasta lagi mikudagin 28. mars 2001 kl. 15.30. Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið, Postsmoga 347, 110 Tórshavn**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálastýrið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.

**FISKIMÁLASTÝRIÐ**
Yviri við Strond 17 • Postsmoga 347 • 110 Tórshavn
Telefon 35 30 30 • Telefax 35 30 35 • E-mail: fisk@fisk.fo

**Fiskimálastýrið**
*Aðalskrivstovan*

# Deildarstjóri til Fiskimálastýrið

Í Fiskimálastýrinum verður starvið sum deildarstjóri fyri Fiskivinnustovuna hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Fiskivinnustovan er skipað sum deild í Fiskimálastýrinum.

**Starvið inniber m.a. hesar upppgávur:**
Dagligu leiðsluna av Fiskivinnustovuni, herundir standa fyri:

- At fyrireika og umsita fiskivinnulóggávuna, kunngerðir og reglugerðir ásett samsvarandi við atliti at burðardyggari fiskivinnu og at umsita stýringsamboðini í fiskivinnuni
- At hava eftirlit við endamálsorðingum í galdandi fiskivinnulóggávu herundir at skipanir, settar í verk, lúka settu treytir
- At umsita og málsviðgera veiði- og fiskiloyvir, herundir royndarloyvir
- At samskipa og luttaka í fiskiveiðisamráðingum við onnur lond
- At samskipa og luttaka í samráðingum í millumlanda fiskiveiðifelagsskapum
- At samskipa ta føroysku luttøkuna í tí norðurlendska fiskivinnusamstarvinum
- At umsita fiskiídnaðarmál í Fiskimálastýrinum
- At menna fiskivinnuna á landi
- At umsita vinnugransking innan fyri økið hjá Fiskimálastýrinum
- At veita ráðgeving í tvørgangandi málum í Fiskimálastýrinum og til landsstýrismannin
- At samstarva um tvørgangandi uppgávur í Fiskimálastýrinum

**Førleikakrøv:**

- Útbúgving frá hægri lærustovni
- Hollan kunnleika til almenna umsiting
- Royndir at umsita fiskivinnumál
- Leiðsluroyndir
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

**Setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 37. lønarflokki sambært avtalu millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálastýrið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmannsskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskivinnustovan.

Starvsheitið er deildarstjóri og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til aðalstjóran.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálastýrinum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálastýrinum í hendi í seinasta lagi mikidagin 28. mars 2001, kl. 15.30. Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið, Postsmoga 347, 110 Tórshavn**

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálastýrið á tlf. 353030 og tosa við Kaj P. Mortensen, aðalstjóra.

**FISKIMÁLASTÝRIÐ**
Yviri við Strond 17 • Postsmoga 347 • 110 Tórshavn
Telefon 35 30 30 • Telefax 35 30 35 • E-mail: fisk@fisk.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin



# Bilur við skaða til sølu

**Ein Ford Focus 1.6, 5 hurðar.**

Bilurin hevur skaða framman og verður seldur fyri hægsta boð sum hann stendur við skaða.

Skrásettur fyrstu ferð 30.11.2000.
Koyrt 3.500 km.




**REYNI-SERVICE**
**tlf. 313040 · lokal 20-27**

# Borari

Søkt verður eftir royndur borara at koyra Roc 410 borivogn.

**Fa. Jón Kári Højgaard**
**Tlf. 217425 og 448452**

# Dagrøktarmamma

Dagrøktarskipanin í Sumbiar kommunu søkir eftir einari dagrøktarmammu at arbeiða sum frítíðaravloysara.

Møguligar umsóknir skulu vera bygdarráðnum í hendi áðrenn 25. mars 2001.

**Dagrøktarskipanin**
970 Sumba
Tlf. 370344 og 373506

# Bilur við frontskaða til sølu

**Merki:** Mazda 626 2.0TDI ST.CAR GLX
**Árg.:** 1999

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.
Avtala um at síggja bilin kann gerast við deild okkara í Klaksvík.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Ólavur Samson
Tlf. 456190 - Fax nr. 456527

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

# Aðalfundur

**Fornminnisfelagið í Nes kommunu**

lýsir hervið til
**aðalfund leygardagin 24. mars 2001**
í gamla prestagarði kl. 16.00

Á skránni er sambært lógini:

1. Frágreiðing frá virki felagsins í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
3. Nevndarval
4. Val av tveimum tiltakslimum og tveimum roknskapargrannskoðarum
5. Val av nevnd til Bygdasavnið í Nes kommunu
6. Ymiskt.

**Nevndin**

***Høvuðsreingerð***

*Privat, virkir, fyritøkur, stovnar, skip og bussar*

**Vaskarí & Reingerð**
**tlf. 316300**
**gsm 211312**

**Fái eina høvuðsreingerð nú áðrenn sólin sær!**

Original
bosal
Útstoyt



ES

**p/f Esmar Simonsen**
**Kambsdalur**
**FR-530 Fuglafjørður**
**Tlf. 444405**
**Fax444629**

# Vágs Havn

Søkt verður eftir umsjónarmanni til Vágs Havn.

Umsøkjarin skal hava nautiska útbúgving og hollan kunnleika til enskt mál í skrift og talu.

Eisini skal umsøkjarin duga at arbeiða við teldu.

Løn samb. sáttmála millum Starvsmannafelagið og Vágs Kommunu.

Umsóknir við prógvum og ummælum verða at senda til:

**Vágs Kommuna - Havnanevndin**
FO-900 Vágur

í seinasta lagi 2. apríl 2001.

**Vágs Havn**

# CAFÉ NATÚR

Vit selja allir rættir út av húsinum t.d.

- Cafédrykkir og súpan í termokrússum
- Bakað epli o.a. heitir rættir
- Sandwich o.m.a.

Enskur vísusangur og undirhald

*Doc undirheldur frá 8. til 18. mars*

Broyttur matarseðil

Nógv nýtt leskiligt er komið á matarseðilin, t.d. av víni og cafédrykkum. Nógv nýggj sløg av sandwich.

*livandi tónleikur*

CAFÉ NATÚR
**Tlf. 31 26 25**

Vaskivognar Kantinuvognar





Vit hava nógv ymisk snið av vaski- og kantinuvognum á goymslu. Vitja framsýnigarhølið okkara ella ring og fá eitt prát við okkum. Vit senda sjálvandi katalog um alt landi.

P/F Thomas Dam á Hálsi
Heykavegur 3 Tlf. 311400

# FARTELEFONIR

***GSM - NMT 450***

***Tráðleysar telefonir o. a.***

***Ymisk merki, so sum:***

MOTOROLA
ERICSSON
NOKIA Connecting People
SIEMENS
BENEFON

SØLA & TÆNASTA
**Storno**
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045